um. VS hevur higartil ongantíð leitt nakra arbeiðararørslu. Rákið í VS gongur í løtuni móti spjaðing.

Tað er uttan iva DKP, ið er tann rørslan innan danska vinstravongin, ið hevur ta størstu ávirkanina.

Men DKP hevur — eins og hinar rørslurnar — ferð eftir ferð víst, at hon ikki er oddalið hjá teirri arbeiðandi stættini. Serstakliga tey seinastu árini er hetta komið greitt til sjóndar.

DKP gongur rætt og slætt inn fyri parlamentarismu, stættarsamstarvi og er verðin ein bági fyri menningina av stættarstríðnum í Danmark.

DKP er Sovjetborgarastættarinnar amboð í Danmark — altjóðaliga sæð.

Av hesum orsøkum er tað greitt, at tað er tørvur á *Kommunistisk Arbejderparti*.

Reformisma og revisionisma í DKP

— Hvussu skal hugtakið »reformisma og revisionisma í DKP« skiljast?

— Í uppskotinum til politiska grundarlag DKP frá 1969 verður beinleiðis sagt, at »fremjanin og loysnin av teimum grundleggjandi uppgávunum til sosialismuna í okkara landi« vil henda við fólkatinginum sum miðdepli fyri teimum politisku avgerðunum.

DKP hevur hervið avmarkað tann kommunistiska politikkin og tað kommunistiska arbeiðið til at vinna meirilutan í fólkatinginum, sum ta týdningarmestu treytina fyri at sosialisman kann setast í verk í Danmark.

Á sama hátt sum teir reformistisku kommunistarflokkarnir í Italien og Fraklandi, tosar DKP eisini um at broyta teir ymisku statsstovnarnar — ið eru reiðskap til fremjanina av einarædi monpolkapitalsins — til stovnar, sum skulu kunna tæna tí arbeiðandi fólkinum. Hesa sosialdemokratisku læruna kallar DKP enntá fyri marxist-leninistiska, fullvæl vitandi, at bæði Marx og Lenin harðliga stríddist mótvegis hesari og líknandi læru.



1. Maj-bókhandilin hjá KFML í Rosenborggade í KBH.

Harafturat tosar DKP um at náa sosialismuna gjøgnum friðarliga yvirgongd — og enntá við hjálp frá danska sosialdemokratiska flokkinum, sum tað á ein ella annan hátt skal eydnast tí, at trýsta til ein veruliga kommunistiskan politikk.

Søgan hevur týðuliga og klárt prógvað, at tann ráðandi stættin ongantíð frívilliga letur sítt vald frá sær, men at hon harafturímóti nýtir statsvaldið til at kúga stríðið hjá teirri arbeiðandi stættini fyri sosialismu. Seinasta søguliga dømi er Chile.

Tað kann vera vert at minna á, hvørja niðurstøðu einkjan eftir Salvador Allende kom til aftaná afturhaldskvettið. Hon segði: »Tað er ikki nóg mikið at vinna valdið gjøgnum atkvøðugreiðslu. Fólkið skuldi havt verið vápnað ella havt ein her í sínari tænastu«.

eitt annað, sum KFML (KAP) leggur stóran dent á í

Eitt annað, sum KFML (KAP) leggur stóran dent á í sínari metan av DKP, er tann bejnleiðis stuðulin til politikk Sovjetsamveldsins. DKP hevur í hyggju at innføra »sosialismuna« í Danmark eftir sovjettiskum mynstri.

KFML (KAP) er av teirri fatan, at Sovjetsamveldið er ein vandi fyri sjálvræði Danmarkar á sama hátt sum USA er tað í dag av teirri orsøk, at Sovjetsamveldið ikki longur er ein sosialistiskur statur, men kapitalistiskur-fascistiskur statur. Hetta hava vit viðgjørt gjølla í okkara tíðarriti »*Kommunistisk Tidsskrift*«.

Reformisma í orðum stættarsamstarv í verki

Reformisma í orðum — Á hvønn hátt kemur reformisman í DKP til sjóndar í tí dagliga stríðnum?

— Hon kemur til sjóndar á mangar ymiskar mátar, men lat meg koma við nøkrum dømum.

Í 1974 táið fleiri 100.000 arbeiðsfólk vóru í verkfalli leiddi DKP hesi á villinisleið við at gera teirra krøv til eitt krav um, hvør sat í stjórn í Danmark. Loysunarorð DKP var eitt nýtt fólkating við fleiri DKP'arum, sum kundu verða stuðlar fyri danska sosialdemokratiska flokkin, ið — sum kunnugt — ger alt fyri at umsita kapitalistisku áhugamálini so væl tilber.

Ein onnur líka so týðulig og avdúkandi hending fór fram á B & W-oynni seinasta heyst, tá ið DKP gekk inn fyri at steðga einum verkfalli, hóast tað var neyðugt og møguligt at halda fram við tí.

Stættarsamstarvspolitikkurin hjá DKP kom eisini klárt til sjóndar í vár á B & W-skipasmiðjuni. Tað var stórur vandi fyri at fleiri B & W-arbeiðspláss skuldu leggjast niður, men felagsálitismaðurin, Johnny Laugesen úr DKP, gjørdi yvirhøvur onki fyri at stríðast ímóti niðurleggjanini av hesum arbeiðsplássum. Tá ið limir frá KFML á staðnum funnust at honum fyri hesa støðutakan hansara, gekk DKP inn fyri at stuðla leiðsluni í B & W í at geva KFML-limunum fótin.

Hvat útbúgvingarpolitikkinum viðvíkur so kann staðfestast, at útbúgvingarpolitikkur DKP er í nágronnum samsvari við útbúgvingarpolitikk danska statsvaldsins.

Ein av orsøkunum til hesar og aðrar líka so grovar gerðir og støðutakanir hjá DKP er, at DKP næstan er til reiðar at gera alt fyri at nærkast danska sosialdemokratiska flokkinum.

Álop kapitalsins

Hvør er gongdin í donskum politikki í dag?

— Tað gongur móti høgru — kapitalurin er í álopi.

Tann 4. mai í ár varð blokadurætturin avtikin, og verkfallsrætturin fer eftir øllum at døma eisini at verða tað.

Statsvaldið leggur fleiri og fleiri byrðar á tað arbeiðandi fólkið. Politikkur statsvaldsins er at lata fólkið gjalda kreppuna hjá kapitalismuni. Hetta merkist serstakliga nógv viðvíkjandi teimum sosialu niðurskurðunum í samband við barnagarðar og vøggustovur, á heilsuøkinum, á íbúðarøkinum, stuðulin til tey lesandi o.s.fr.

Tey arbeiðandi fáa ikki endurgjald fyri príshækkingarnar.

Tann seinasta sáttagerðin kostaði hvørjari familju uml. tveytúsund krónur árliga.

Og hetta hendir samstundis sum vit hava 100.000 arbeiðsleys.

Arbeiðarastættin er í verjustøðu. Hendan støðan versnar í samband við reformismuna í DKP, SF og VS, soleiðis sum hon frá hesum flokkum kemur fram í danska stættarstríðnum.

Teir bureaukratisku sosialdemokratisku og DKP leiðararnir í fakfeløgunum taka øll snildi í nýtslu fyri at tryggja sítt vald. Ódemokratiskir atkvøðuhættir, fólk missa arbeiðið vegna politiska áskoðan og hetta verður vart av fakligu leiðarunum, og á fleiri og fleiri arbeiðsplássum taka borgarligagjørdir fakfelagsleiðarar til politiskan censur.

KFML stríðist fyri atgerðareind

Hvussu ætlar KFML (KAP) at møta álopinum frá borgarastættini?

— KFML gongur inn fyri at savna eina so stóra fjøld sum møguligt fyri ávísum partakrøvum. Taktiskt vil tann kommunistiski flokkurin fara í part við aðrar partar í partstríðnum. KFML stríðist fyri atgerðareind mótvegis tí einstaka kapitalistinum, statsvaldinum og imperialismuni.

Tann mótsatti politikkurin viðførir óumgangiliga til avbyrging, og KFML hevur sterkar atfinningar at honum.

Kommunistar kunnu ikki vera ímóti atgerðareind, endar Benito.

Heldur tú ikki **BLAÐIÐ** sum umboðar landsins størsta flokk?

Undirritaði:

Navn: _____

Bústaður: _____

tekni meg sum haldara av SOSIALINUM
Sendið hendan lepa í afturlatnum brævbjálva til:

sosialurin *box 76, 3800 Tórshavn*

Framhald frá síðu 7

firði til Havnar, sigur Ivan Johannesen.

Stovnað fyri ári síðan

LBF varð stovnað í november í fjør, og eru øll bjargingarfeløgini í Føroyum umboðað. Bjargingarfeløg eru í Klaksvík, Fuglafirði, Kollafirði, Havn, Vágum og á Eiði.

Umsetningurin 38 milj.

Umsetningurin hjá Reyða Krossi í Danmark var seinasta ár 38 milj. kr. Hetta vísir, at felagið hevur eitt víttfevnandi arbeiði.

Tað er landsskrivarin í Reyða Krossi í Danmark, Jørgen Petersen, sum upplýsir hetta. Hann er staddur í Føroyum í sambandi við keypi av sjúkabilunum, og í sambandi við arbeiði hjá REyða Krosii í Føroyum.

Lýsið í Sosialinum

Reyði Krossur skipar fyrst og fremst fyri skeiðvirksemi á tí heimliga økinum. Hetta eru vanlig skeið í fyrstuhjálp, og sum nakað nýtt skipar Reyði Krossur eisini fyri skeiðum í sjúka- og heilsuviðgerð. Hesi skeið verða skipað á sama hátt sum samarittarskeiðini.

Reyði Krossur í Danmark hevur eisini eina ungdómsdeild, sum hevur sama endamál sum høvuðsdeildin — at útbúgva og fyrireika fólk ímóti vanlukkum og kríggi. Deildin hevur eisini til uppgávu at vitja eldri og einslig fólk.

Sjálvsfiggjandi

Jørgen Petersen sigur, at Reyði Krossur næstan er sjálvsfiggjandi. Men hann fær eisini stuðul frá tí almenna til skeiðini í sjúka- og heilsuviðgerð. Haraftrat koma so skeiðini í fyrstuhjálp undir frítíðarlógina.

Annars fær Reyði Krossur pening til arbeiði sítt gjøgnum limagjald, húsainnsavningar og lutaseðlasølur.